VIÐMERKINGAR

# Miðskiljing og villeiðing

**Jón Guttesen**
*Valevni Tjóðveldis-floksins til Fólkatingið*



*Tá ætlanir vanta eru miðskiljingar vantandi . Tá grundgevingar vanta, eru villeiðingar til at taka.*

Aðrir flokkar skýra virksemi hjá Norðuratlandsbólkinum klandur og siga seg duga samstarv. Hesum er einki hald í. ABC umboðini hava allir valt at verðið leysgangarir, einsamallir fólkatingsmenn, uttan samstarvsfelagar og netverk og veljarin kann bert gita, hví so er.

Men Tjóðveldisflokkurin vildi annað og meira. Tjóðveldisflokkurin savnaði umboðini úr útnorði og fekk samstarv í lag. Somuleiðis er Tjóðveldisflokkurin í samstarvi við fleiri enn 80 fólkatingslimir um nevndarsessir o.a. Fleiri av fremstu fólkatingslimunum hava luttikið í upplýsandi arbeiðnum hjá Norðuratlantsbólkinum. Sama hava serfrøðingar úr Føroyum og norðurlondum og fleiri føroyingar, niðri í lestrarørindu.

Aðrir flokkar kalla Norðuratlandsbólkin fyri ein kaffiklubb. Her fara teir tó ikki heilt skeivir.

Norðuratlandsbólkurin er eitt forum, har Tjóðveldisflokkurin hevur savnað fremstu serfrøðina kring norðanlond at lýsa og greina støðu Føroya í ríkinum og í heiminum. Og at lýsa og greina peningarenslið millum partarnar í ríkisfelagsskapinum. Og fleiri av fremstu politikkarum á fólkatingið hava luttikið.

Aðrir flokkar siga seg vera virðilig umboð, og Tjóðveldisflokkurin ikki. Hetta er als ikki rætt og fólkatingslimir eru samdir. Meðan einki sæst eftir ABC flokkarnir, hevur Tjóðveldisflokkurin skapt virðing um søk Føroya á fólkatingið og hevur gjørt tað við at verða virkin og sjónligir.

Aðrir flokkar siga seg vilja gransking á fólkatingið. Hetta er burtur úr vón og viti og greið miðskiljing av uppgávuni ið liggur fyri framman.

Vil samgongan gransking, eigur hon at gevast við at skerja granskingina - frá lítið, niður í einki. Vil samgongan hava fleiri samstørv í lag við lærdar háskúlar uttanlands, skal hon gevast við at skerja orkuna hjá okkara egna lærda háskúla.

Góði veljari, lat týtt val verða greitt og ikki stjórna miðskiljingum og villeiðingum.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

## Gjald fyri valgreinar

Eins og tað hevur verið vanligt í tíðini fram til eitt val, fer Sosialurin aftur hesa ferð at taka gjald fyri valgreinar, sum verða settar í blaðið, hetta fram til fólkatingsvalið.

Gjaldið fyri valgreinar er helvtin av vanligum lýsingarprísi.

**Sosialurin**

# Javnaðarflokkurin ríður á fleiri hestum

**Niklái Petersen**
*Tjóðveldsiflokkurin*



Lurtaði við áhuga eftir framløgusendingini hjá Javnaðarflokkinum í ÙF týskvøldið, og tað undraði ikki sørt at hoyra, hvussu ymiskt framborið varð av valevnunum um Ríkisrættarligu støðu okkara og ES spurningin.

Úr Sandoynni ein tann fragasta sambandsrøða, eg havi hoyrt leingi. Innan úr Eysturoynni meira á sjálvstýrisbógvin og av Signabø ein meira hóvlig tjóðveldisrøða o.s.v.

Ei undir í at Føroya Løgmaður sum formaður Javnaðarfloksins tyktist sera ullintur í sínum útsøgnum til tíðir, maðurin veit ikki hvat hann skal siga, og mælir til breiðar semjur, praktmatiskar loysnirnar, og bla- bla- bla.

Hvat skal hann annað, tá flokkurin spennur so víða, líka frá ytst á sambandsvonginum og langt út á loysingarvongin.

Løgmaður tosar ofta um polariseringina í føroyskum politikki millum Sambandsflokkin og Tjóðveldisflokkin, hesa polarisering hevur hann jú beint inni í sínum egna flokki. Tosaði nakar um at blása og hava mjøl í munninum!!

Er hetta ikki at halda sínar veljarar fyri tað turra spott??

Eg haldi Javnaðarflokkurin skyldar veljarum sínum, hvat hann veruliga vil, og ikki alt hettar uttanumtosið.

Nei, tóna reint flagg sum flokkur, tað hava fólk krav uppá í dag.

Tjóðveldisflokkurin tónar reint flagg í hesum viðurskiftum.

**Vel so tað munar- val góða røkt - vel Tjóðveldisflokkin - vel E.**

# 120 milliónir til gransking og menning

**Marjus Dam**
*valevni Sambandsfloksins*



Í Ríkisfelagsskapinum er góður møguleiki hjá Føroyum at fáa 120 milliónir kr til gransking og menning.

Tað er okkara partur av 10 milliardum krónum, ið Danmark ætlar at nýta til gransking og menning komandi árini.

Ein slík íløga til gransking í Føroyum, kundi verið við til at sett ferð á at skapa nýggjar vinnuligar møguleikar í Føroyum.

Fullveldistosið seinastu 5 árini var eitt skaðiligt tíðarskeið fyri Føroyar. Mikil goragandur, klandur og undirskot á fíggjarlógini vóru úrslitini. Søgan fer at vísa, at mest skaðiliga tíðarskeið í føroya søgu var fullveldistíðin.

Á Fólkatingi hava tjóðveldisumboðini bert keglast og fornerma tey við høvdu havt best gagn av at samstarva við.

Fyri Tjóðveldisflokkin hava ein rópari og ein heimsmeistari í manipulatión sitið á Fólkatingi. Nú hevur ein skemtari so eisini stilla upp. Nú kann ein fara á Cafe at hoyra skemt. Ímeðan vinnan bløðir orsaka av ongum vinnupolitikki. Útjaðarin er við at fara í spønir, og landskassin hevur stórt hall orsaka av loysingarpolitikki – ja so verður veljarin boðin til skemt. At teir ikki skamma seg.

Tað er eitt at gera: Blaka loysinginga á bláman og vel eitt ella tvey sambandsumboð á Danating.

Vit hava loysnirnar

# Eitt lagnuval

**Heini O. Heinesen**
*fólkatingsvalevni*
*heima.olivant.fo/~hoyh/*



Hetta valið kann gerast eitt lagnuval fyri føroya land og tað fólk sum her búðleikast. Tað er serliga tí at tjóðveldisflokkurin bjóðar seg fram at umboða føroysku tjóðina á danatingi.

Tjóðveldisflokkurin fer ikki á danating at føra danskan partapolitikk, heldur ikki fer flokkurin at bera føroyskan partapolitikk niður á danating.

Tað sum eg serliga hugsi um, er tað sum nú er komið í eyga ein "ES-grundlóg" fyri alt ES sambandsríki.

Hettar kann koma at hava avgerandi týdning fyri okkara framtíð sum tjóð. Tað sum vit fara greiða donskum politikkarum frá er, at ein stórur meirluti av føroya fólki ikki tekur undir við at Føroya land verða innlima í ES sambandsríki sum danskur ríkislutur.

**Tilfeingi á Føroyagrunninum**

Alla hesa øldina hava føroyingar stríst ímóti útlenskum royndum at ogna sær tilfeingið á Føroyagrunninum.

Tað er einum og hvørjum greitt, at tjóðveldisflokkurin er besta boðið upp á at verja okkara natúrtilfeingi olju og -fiskiríkidømi.

Tað hevur hann prógvað ferð eftir ferð, síðan hann var stovnaður, við stuðli frá fiskimonnum.

Hetta vilja vit eisini gera á fólkatingi, tá tað gerst neyðugt.

Allir hinir flokkarnir hava eina jánkasliga støðu til tað, sum rørir seg við at Danmark ætlar at avreiða sín avgerðarrætt á hesum øki til ES.

Tjóðveldisflokkurin er einasti flokkur, sum hevur víst í verki, at vit ikki geva okkum, sjálvt um hart leikar á, og tað brýtur í bæði borð.

Tað gav at bíta tá kreppan leikaði á sum harast í 1993 tá vóru tað vit sum settu út í korti, ímóti harraboðum úr ES landinum Danmark, og settu eina føroyska skipan í gildi fyri okkara høvuðsvinnu.

Henda skipan hevur roynst sera væl seinastu 10 árini við serliga góðum fiskiskapi fyri flest allar skipabólkar.

Í dag er støðan tann at henda skipan er við sindrast av løtuvinningspolitikki, meðan løgtingið situr **sum rissa yvir deyðum fyli.**

Tjóðveldisflokkurin bjóðar seg aftur fram at møta á danatingi aftaná valið, tí vit vilja halda fast um rættin sjávir at stýra okkara egna olju og — fiskivinnu politikki.

Fólkatingsvalið kann eisini brúkast til at markera føroyskan politikk, tí velur tú tað valevni sum kann vísa á tey bestu úrslitini.